Orðaskifti:

# Sjómenn eftirløn

Undirritaði hevur við áhuga fylgt við orðaskiftinum um løgmansrøðuna. Hóast viðurskiftini um ríkisfelagsskapin mundu eiga bróðurpartin av orðaskiftinum, so kom ein av løgtingsmonnunum í móti endanum av orðaskiftinum inn á, at »pensiónslógin« átti at vera broytt soleiðis, at sjómenn fingu eftirløn tá teir vóru 60 ára gamlir og útslitnir.

Tað var skjótt, at fleiri tingmenn søgdu seg vera samdar við tann eina tingmannin um, at sjálvsagt áttu sjómenn at fáa eftirløn frá tí teir vóru 60 ára gamlir og útslitnir.

Breiðast var semjan um, at tað líktist ongum, at Føroya Fiskimannafelag við formanninum Óla Jacobsen á odda, ikki fyri langari tíð tíðan hevði fingið eina slíka skipan fyri fiskimenn. Ingeborg Vinther mátti sjálvsagt fáa sítt. Eg kenni tað ikki sum mína uppgávu at bera í bøtuflaka fyri formannin í Føroya Fiskimannafelag fyri eftirlønarviðurskiftir hjá sjómonnum, og heldur ikki fyri Ingeborg Vinther, men av tí at eg haldi meg hava eitt sindur størri innlit í tað málið, hvat viðvíkur sjómonnum, enn løgtingsmenn undir viðgerðini av løgmansrøðuni sýntust at hava, so loyvi eg mær at koma við niðanfyri standandi upplýsingum, okkara løgtingsmonnum og kvinnum til kunnleika.

Fyri fleiri árum síðan, minnist meg rætt var tað meðan Jóanes Eidesgaard var Fíggjarmálaráðharri, var eg fyri fyrstu ferð við í málinum um eftirløn til sjómenn. Byrjað varð at arbeiða við at fáa eina lívstrygging og eina frítíðarvanlukkutrygging og eina eftirlønartrygging fyri sjómenn. Samráðingar vóru við Føroya Lívstrygging og Føroya Vanlukkutrygging um sáttmála fyri slíkar tryggingar. Partarnir, tryggingarfeløgini: Føroya Lívstrygging og Føroya Vanlukkutrygging øðrumegin og manningarfeløgini: Føroya Fiskimannafelag, Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Føroya Motorpassarafelag og Maskinmeistarafelag hinumegin, sóu skjótt, at neyðugt var at taka takið í stigum og valdu tí at taka lívstryggingina og frítíðarvanlukkutryggingina fyrst. Partarnir sóu eisini skjótt, at innkrevjingin av tryggingargjaldinum var í sær sjálvum eitt stórt mál.

Fyri at tryggja, at vit kundu fáa eina so effektiva og rættvísa skipan sum gjørligt, varð roynt at fáa innkrevjingina um samtíðarskattaskipanina. Grundin fyri tí var, at lønin hjá fiskimonnum er sera ójøvn. Tí var ætlanin at tað av hvørjari avrokning (lønarflyting) skuldi dragast ein upphædd, svarandi til eitt ávíst % stig av hvørji avrokning. Ætlanin var eisini, at tað skuldi vera loft í, so at eingin kom at gjalda meir enn eina ávísa upphædd.

Tá fiskimenn ofta skifta millum skip og reiðaríir, kundu reiðaríini ikki átaka sær at fylgja við, hvussu nógv hvør hevði goldið, og so steðga frádráttinum, tá ásetta hægsta upphæddin var nádd. Eisini er tað ein trupulleiki at fáa allar avrokningarnar, og harvið vita, hvussu nógv teir, ið eru fevndir av tryggingini skulu gjalda.

Skrivað hevur verið til allar fíggjarmálaráðharrar,, ið hava sitið síðan vit byrjaðu at arbeiða við málinum. Tíðin hjá Jóanesi Ejdesgaard sum landsstýrismaður ta ferðina fekk ein heldur bráðan enda, og tí hendi ikki tað stóra við tí málinum.

Síðst Anfinn Kalsberg sat sum fíggjarmálaráðharri, segði hann seg vera positivan og royndi at fáa eina loysn. Fundur var við Elektron, ið segði, at teir ikki kundu greiða málið fyrr enn um eina ávísa tíð, eg hugsi



tað var út móti jólum eitt ári. Jólagávan tað ári var, at tað ikki passaði inn í arbeiðsplanin hjá Elektron fyrr enn í september mánaða árið eftir og soleiðis hevur tað gingið.

Fyri at fáa lívstryggingina og frítíðarvanlukkutryggingina í gongd, var avgjørt at tryggingargjaldið skuldi vera eitt ávíst krónutal fyri hvønn mann fyri hvønn mynstraðan dag. Hettar varð gjørt, hóast vit vistu, at hetta er ein sera ósolidarisk skipan, sum í veruleikanum førir til, at skipari og manning á teimum skipunum, ið fáa størstu hýruna fyri hvønn daginteir eru til fiskarí, teir kunnu vera færri dagar burtur, enn við teimum skipunum, har hýran er lakari. Harvið eru tað teir, ið vinna fægst krónur fyri hvønn dagin, ið lætt kunnu koma at gjalda tað hægsta tryggingargjaldið. Hóast tað, so haldi eg, at tað var rætt at seta ta skipanina í verk.

Eisini meðan hendan samgongan hevur sitið hevur tað verið roynt at fáa loysn á hesum máli. Fíggjarmálaráðharrin sigur seg vera positivan fyri at virka fyri at tað skal bera til. Fundir hava verið við umsitingina har ymiskir møguleikar hava verið umrøddir. Tosað hevur verið um annaðhvørt at avgreiða innkrevjingina um samtíðarskattaskipanina ella gjøgnum eina ALS líknandi skipan. Eg havi skilt tað soleiðis, at A-skattaskipanin tolir ikki, at tað verður hongt ov nógv upp í hana. Til eina ALS líknandi skipan skal P-talið brúkast og tað hava vit ikki fingið loyvi til enn og sostatt hava vit ikki fingið eitt arbeiðsamboð, ið ger, at feløgini hava sett seg før fyri at fara undir eina eftirlønartrygging fyri fiskimenn.

Eg kundi greina hesi viðurskiftini enn meira, men eg hugsi ikki tað tænir nøkrum endamáli.

Eg vil tó nevna, at í Føroya Skipara- og Navigatørfelag hava vit tikið tað stigið, at brúka stóran part av lønarhækkingini við síðstu sáttmálasamráðingar, fyri tað fastlønta fólkið, til eftirlønartrygging, men tað er ikki uttan trupulleikar. Tað eru reiðarí, har tryggingargjaldið ikki er goldið, tó uttan at skipari og stýrimenn hava fingið eina tilsvarandi hægri løn.

Út frá tí stóra og heilhjartaða áhuga sum løgtingsmenn góvu til kennar undir viðgerðini av løgmansrøðuni viðvíkjandi eftirløn fyri sjófólk, fari eg hervið at loyva mær at heit aá bæði landsstýri og løgting um at bera so í bandi, at manningarfeløgini kunnu fáa eina skipan, ið ger innkrevjingina av gjaldinum til lívstryggingina og frítíðarvanlukkutryggingina bæði léttari og rættari og at skaptir vera møguleikar, so at manningarfeløgini seta seg før fyri at seta á stovn eina eftirlønartrygging fyri sjófólk og onnur feløg fyri sínar limir.

Uttan at karmarnir verða skaptir, verður tað ótrúliga tungt at umsita eina eftirlønartrygging, sum tryggjar, at peningurin verður inngoldin við rættari upphædd, til ásetta tíð og til rætta viðkomandi.

**Á floti 9.8.2000**
**Ellintur M. Abrahamsen**

# Diabetes er ein vandamikil sjúka



»Vit mugu nýta meira pening til sjúkrahúsini, og fyribyrging skal verða hornasteinurin í okkara starvið í móti teimum vaksandi trupulleikunum við diabetes (sukursjúku)« segði Helena Dam á Neystabø, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, á fundi í Havn fríggjadagin.

»Heilsuverkið skal hava fleiri rescoursir so tað kann bjóða eina effektiva og liðiliga viðgerð av fleiri og fleiri fólkum, ið fáa diabetes. Men pláss skal eisini verða fyri, at motivera allar føroyingar til at ansa eftir sær sjálvum. Tað er prógvað, at royking, ringir matvanar og manglandi motión er orsøkin til diabetes, hjartasjúku og aðrar fólkasjúkur. Tí má bæði viðgerð og fyribyrging prioriterast høgt,« segði Helena Dam á Neystabø, landsstýrismaður. »Vit eiga at lurta eftir royndunum hjá øðrum, men okkara framtíðar viðgerð skal byggjast á egnar royndir«.

Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum helt røðu á fundi, sum diabetesfelagið í Føroyum skipaði fyri. Á fundinum luttóku løgtingsmenn, læknar, sjúkrasystrar, kostráðgevarar og umboð fyri øll norðurlendsku diabetesfeløgini.

»Talið á aldursadiabetikarum í øllum Europa veksur við fúkandi ferð« segði Kristiana Rein, formaður í føroyska diabetesfelagnum, »og hetta er ein sera stór avbjóðing fyri heilsuverkið.«

Jak Jervell, norskur professari, vísti á, at fólk gerast alsamt eldri, men tað er tann nútímans lívsstílurin, ið er orsøkin til, at vøksturin í talinum av diabetikarum er so stórur. Jak Jervell helt, at samfelagið má broytast, um talið av diabetikarum skal minka.

»Tað skal nýtast meira peningur til heilsuverkið, men tað fer at viðføra at sparingar koma á nógvum øðrum økjum í samfelagnum seinni«.

»Í Danmark eru umleið 125.000 diabetikarar, men talið verður helst 100.000 hægri, um vit kanna fólk ið viga ov nógv og fólk, har diabetes er í tí nærmastu familjuni,« segði Oluf Borbye Pedersen, professari á Steno Diabetes Sentrinum í Danmark. »80% av útreiðslunum til diabetes í Danmark verður nýtt til at viðgeða fylgisjúkur, og minni enn 10% verða nýtt til fyribyrging. Hetta er eitt óhent býti. Við betri samstarvið millum sjúkrahúsverkið og kommunulæknar, við eftirútbúgving av kommunulæknunum, við tvørfakligari viðgerð, við at ansa betur eftir sær sjálvum, við regluligum eygnakanningum og einum innsatsi móti beinsárum, kann man broyta tær vánaligu framtíðarvánirnar fyri diabetikararnar«.

Oluf Borbye Pedersen segði, at at skjótt fyriliggur ein bíligur og effiktivur háttur at screena fyri aldursdiabetes. Í dag eru møguleikar fyri samfelagsøkonomiskari gagnligari medisinskari viðgerð móti blóðtrýsti, feitti og sukuri í blóðinum.

Hagtøl í Danmark vísa,

- at 50% av diabetikarum gerast blind
- at 10-15% gerast nýrasjúk
- at 50% gerast álvarslig sjúk í æðrarenslinum
- at 40% gerast sjúk í nervalagnum, og
- at 2% fáa stórar amputatiónum gjørdar.

»Álvarsemi í sjúkuni, og tað vaksandi talið av diabetikarum, má vera grundgeving til skjót politisk tiltøk« segði Oluf Borbye Pedersen at enda.

Norðurlendski diabetisfundurin, sum hevur verið í Føroyum síðani hósdagin endaði á middegi sunnudagin. 33 luttakrar frá diabetesfeløgunum í Finnlandi, Svørríki, Danmark, Noregi, Íslandi og Føroyum, vóru á fundinum.

**Diabetesfelag Føroya**
**Kristiana Rein, formaður.**

# Føroysk nýskipan

Sambandsflokkurin vil hava eina FØROYSKA Nýskipan:

Fullveldið samgongunar er ein avolda, í okkara samfelagið, ónýtilig Íslendsk skipan. Okkara uppskot er nýtt og FØROYSKT:

Uppskot okkara rúmar broytingar til bata:

- Vit vilja hava framburð - ikki hóttafall.
- Vit vilja hava vælferðarsamfelag - ikki avtøku av hesum
- Vit vilja hava fjølgan av føroyingum í Føroyum - ikki fráflyting
- Vit vilja hava skattalætta - ikki skattahækking
- Vit vilja hava at føroyingar skulu ráða í Føroyum - ikki útlendskur kapitalur
- Vit vilja hava frælsi fyri føroyingar í Føroyum - vit selja ikki frælsi fyri fullveldi
- Vit vilja hava eina loysn innan Ríkisfelagsskapin - tí tað er best fyri Føroyar.
- Vit vilja hava eitt kongahús - tí vit eru í einum ríki, við trimum javnt stillaðum pørtum.
- Vit vilja at føroyingar hava evsta vald í Føroyum.

Um Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin (møguliga Fólkaflokkurin) skipaðu fyri ríkisrættarligu broytingum, so vóru vit komnir langt, ja ikki minst høvdu vit fingið eina góða loysn - eisini eina góða búskaparliga loysn. **Vit høvdu fingið eina loysn, har Føroya Fólk segði ja,** og tað er umráðandi. Harmiligt, at samgongan onki fær av skafti, nú tíðin er búgvin, og ein góð loysn er møgulig.



Broyting ja - við skili - í Ríkisfelagsskapinum.

**Marjus Dam.**
**Løgtingsmaður**



# Viðvíkjandi portrinum í Skopunar havn

Í Dimmu 5. august stendur nakað at lesa um Skopunar havn, har ið landsstýrismaðurin Finnbogi Arge verður spurdur.

Sum man kann skilja, so er portrið ein ynskidreymur hjá skopuningum. Hetta er í veruleikanum slett ikki so, eingin hevði verið glaðari enn vit, um vit kundu sloppið av við portrið, men tað skal ikki vera uppá tann mátan, ið tit hava hug at gera. Tí, sluppu tit at rykkja portrið butur, so var tað tað sama sum at geva bygdini mønustingin.

Hví ger mann ikki sum sakkunnleikin sigur.

Umboð fyri Landsstýrið, umboð fyri Landsverkfrøðingin og Skopunar bygdarráð vóru hjá Hydraulikinstituttinum í Hørsholm í Danmark, har ið royndir vóru gjørdar av Skopunar havn.

Tær kanningar vístu púra greitt, at tað sum kom at hjálpa fyri Skopunar havn, var at longja pierin úr Lítlaskerði, so at hann fór út á 70 metrar. Og somuleiðis at endin norðuri á Bergi bleiv stoyptur einar 30 metrar eystureftir, so at grótkastið kundi liggja, ikki sum nú er, at grótkastið fer burtur av brimi, av tí at einki møtir fyri. Men einans 40 metrar eru stoyptir, so tað vistu vit frammanundan, at tað var ikki nóg mikið, men bert ein bati.



Hví hevur man ikki gjørt hesi tingini í summar?

Sjálvur havi eg hoyrt sum slatur í gjøgnum síðsta ár, at portrið skuldi burtur.

Tann 14.02.2000 boðaði Skopunar bygdarráð Landsverkfrøðinginum til fundar, har ið vit ætlaðu at tosa um viðurskiftini við Skopunar havn.

Fundin fingu vit tann 11.5.2000. Tá søgdu umboð fyri Landsverkfrøðingin, at teir høvdu ein upulleika, og tað var at portrið mátti burtur. Tað mótmælti bygdarráðið beinanvegin. Annars høvdu vit ein góðan fund við umboðini hjá Landsverkfrøðinginum.

Eg má venda aftur til skrivið í Dimmu. Fyri mær virkar tað sum ein hóttan. Aftur fyri at vit ikki tagdu meðan portrið bleiv tikið, so skulu vit einki fáa afturfyri.

Eg veit ikki, um hetta er at rokna sum vinskapur við útjaðaran. Eg rokni Sandoynna sum útjaðara, sjálvt um vit liggja nær megingøkinum. Vit hava Skopunarfjørð ímillum okkum.

Síðani vil eg heita á fíggjarnevndina, um at játta peningin, sum tørvur er á til portrið. Og somuleiðis tann pening sum tørvur er á at gera Skopunar havn lidna.

Vit eru næstan komin á mál. Landsmyndugleikarnir hava bert hugsað um samferðsluna. Tað er gott, men tað eru onnur ting, sum havnin skal nýtast til enn bara tað. Tá hugsi eg um útróður, sjúkraflutning og flakavirki.

Eg haldi, at Skopunar kommuna hevur víst ein góðan vilja. Vit hava fólk í drift alt døgnið á keiini at passa portrið, so at báta kunna nýta havnina sum er, og tað gjalda vit sjálvir fyri.

Við hesum verður enn einaferð heitt á fíggjarnevndina, Bjarna Djurholm, formann og allar í nevndini at játta pening til áðurnevnda.

Sum eg skilti, so skuldi tað vera ein góð grundgeving, áðrenn tit játtaðu pening. Vit í Skopunar bygdarráði eru altíð klárir at koma í fíggjarnevndina, at grundgeva fyri okkara stóra máli.

**Vinarliga**
**Gerhard Lognberg,**
**bygdarráðsformaður**
**Skopun**

# Àgangurin móti útjaðaranum tekur ongan enda

*Síðsta dømi er mótstøðan frá miðstaðarøkinum um, at Almanna- og heilsuskúli skal liggja á Tvøroyri*

Nú ein landstýrismaður endiliga hevur dirvið til at seta okkurt ígongd, sum kann merkjast í einum útjaðaraøkið, eru politikarar, feløg og onnur í miðstaðarøkinum á gosi tí niðurstøðan hjá hesum sum búgva í miðstaðarøkinum, er sum altíð, at einki kann lata seg gera uttanfyri Havnina.

Sagt verður, at tey,sum skulu taka útbúgving sum heimahjálparar og almanna heilsuhjálparar og røktarar eru tilkomin fólk við húsi, manni og børnum og at fara til Suðuroyar er so tvørligt, tí tey vera noydd at leiga sær hús.

Hesi sjónarmið er møsn og tvætl úr enda í annan, tí:

- Tað er líka langt fyri næmingar úr Suðuroy til miðstaðarøki sum umvent, har er so eingin munur.
- Tað er nógv lættari og bíligari at leiga sær íbúð í allari Suðuroy enn í miðstaðarøkinum, tað er einki dulsmál at tað er bíligari at fara á skúla í Danmark enn í Havn, vegna íbúðarkostnað og studning.
- Hesu tilkomnu fólk við manni ( kann hann ikki klára seg sjálvan) og børnum (vaksin) fara ídag til Danmarkar fyri at fáa sær útbúgvingina. –Um tað er meira tvørligt at fara til Suðuroy enn til Danmark, so má tað vera vegna studninginum.
- Nýggi SMYRIL hevur rúm, so møguleikin til at gera skúlaarbeiði umborð í 1 tima eru fyrstafloks fyri tey sum vilja sigla ímillum.
- At fólk við leiðslu og fakkunnleika ikki finnast uttanfyri Havnina er tíbetur nakað møsn.
- Tá tað blívur sagt, at tað er munur á at arbeiða í Havn og at arbeiða á Tvøroyri má tað vera tí, at suðringar eru meira skemtiligir og at tað er lýggjari her suðri. Tað kann væl ikki vera tí arbeiðsbyrðan er størri annað staðið?

Samanumtikið er tað einki sum helst til hindurs fyri at leggja skúlan á Tvøroyri og er hetta ein gyltur møguleiki fyri at fáa gongd á útjaðarapolitikkin.

Allir politikarar á tingi hava sagt, at teir vilja stuðla einum útjaðarapolitikki, men tá ið tað er komið til eru teir sum oftast orðloysingar, tíanverri.

Vónandi hendir hetta ikki hesuferð, tí ein Almanna og heislsuskúli í Suðuroy vil menna alla oynna og geva íblástur til anna virksemi, tað er eingin ivi um tað.

**Finnleif Guttesen**
**Tvøroyri**

# Kórkonsert í Vágs kirkju

Hetta er ikki nakað óvanligt, men lesið víðari niðanfyri.

Í hesum døgum hava vit í Føroyum vitjan av týska kórinum »Osnabrücker Jugendchor« undir leiðslu av tí her vælkenda kórleiðaranum Johannes Rahe. Vitjanin er fingin í lag í einum samarbeiði millum Kirkjukórið Ljóm í Vági, Rúna Brattaberg og Johannes Rahe.

Sum navnið sigur er hetta eitt ungdómskór, har sangararnir eru frá 14 til 23 ára gamlir, einir 60 í tali. Tey eru knýtt at Domkirke Osnabrück og er vitjanin her ein liður í eini longri konsertferð, kallað Scandinavia 2000.

Teirra repertoire er stórt, telur o.u. 60 sangir. Tað nógva er kirkjutónleikur, sum fevnir um eitt 1000 ára skeið.

Eini 150 fólk høvdu leitað sær í kirkjuna hetta kvøldið. Hetta er nógv meira enn vanlig uttan fyri Havnina, og var tað hugaligt at uppliva.

Lat meg siga beinanvegin, at konsertin var ein tann besta, eg havi hoyrt. At hon fór fram í stóra vakra kirkjurúminum í Vágs kirkju við tí framúr góða aukustikkinum, gjørdi ikki upplivingina verri.

Konsertin byrjaði við, at kórið kom gangandi inn eftir kirkjugólvinum, syngjandi einraddað okkurt sum líktist gregorianskum sangi. Øll vóru í ljósum kappum. Uppstillingin, sum var á gólvinum framman fyri kórið, var óvanlig. Kórið bleiv koyrt í tvey og tey stóðu ávikavist t.h. og t.v. fyri miðjuna. Hetta hevði fyri mær tvey endamál. Ímillum kórini sást tú altarið og teir vøkru mosaikkrútarnar í einum, altso nakað fyri eygað. Tónleikaliga hevði tað tann fyrimun, at tú betur kundi fylgja við, hvat gekk fyri seg. Stundum sang tað eina kórið og hitt svaraði, og stundum sungu tey saman.

Á skránni vóru 13 sangir, umframt tveir tá tey gingu inn og út, og tveir sangir eyka.

Skráin á hesi konsertini fevndi sum oman fyri nevnt um fjórðingin av teirra repertoire. Vit hoyrdu sangir frá barokktíðini av Lotti, J. S. Bach (kantatuna »Jesu, meine Freude«) og Henry Purcell. Frá romantisku tíðini sungu tey sangir av Cesar Franck (»Panis Angelicus«), Anton Bruckner og Hugo Wolf. Max Reger og Gabriel Fauré førdu okkum inn í 20. øld, har vit hoyrdu sangir av Rudolf Mauersberger, Georgius Bardos, Benjamin Britten (»A Hymn to the virgin«) og Günter Berger.

Eg havi hoyrt kórleiðarar siga, at besti kórklangurin fæst við ungum røddum. Hetta upplivdi ein í ríkt mát á hesi konsertini. At tey sungu reint og presist er næstan óneyðugt at nevna. Tá alt omanfyrinevnda er í lagi kemur dynamikkurin. Hesin gevur sanginum form og fær hann at liva, ja, fær alt ørindið at blíva eina heild. Dynamikkurin var framúrskarandi. Tey sungu frá veikasta pianissimo til harðast fortissimo.

Eitt, sum eg hefti meg við, vóru endakkordirnar, ofta langar og veikar. Tá klangurin hvar, helt leiðarin hendurnar uppi í nøkur fá sekund. Ein kundi hoyra eina nál detta á gólvið. Síðan kom ein avspenning hjá áhoyrarunum, sum í fleiri førum førdi til »begeistraðar« lógvabrestir. Fólk royndu at halda »góðan kirkjusið«, men hetta eydnaðist ikki gjøgnum alla konsertina.

Tá konsertin var liðug, bleiv klapað da-capo tvær ferðir. Sum eyka sang kórið fyrst sjelaran »Locus iste« av Bruckner, og sum annan eykasang »Sig mær, hví er foldin føgur« eftir Sunnleiv Rasmussen og Karstin Hoydal. Ein góður endi á eini stak góðari konsert.

Okkurt er at nevna afturat. Í kantatuni »Jesu, meine Freude« eftir J. S. Bach, sum er í fleiri pørtum, dansaðu tvær ungar gentur ballett til tveir av pørtunum. Sera hugtakandi. Í sanginum »Hymn to the Virgin« av Benjamin Britten fóru nakrir sangarar út í gangin og svaraðu kórinum aftur sum eitt ekko.

Osnabrücker Jugendchor fer í vikuni at syngja norðanfjørðs, eitt nú í Norðurlandahúsinum hóskvøldið 17. aug. kl. 19.30. Skránna kenni eg ikki, men í verðsliga partinum av teirra repertoire eru sangir av tónaskøldum sum Orlando di Lasso, John Dowland, Jhs. Brahms, Max Reger, Hugo Distler, Sunnleivi Rasmussen o.ø. Ivaleyst fara tey at syngja okkurt av hesum tá. Úr repertoirinum av kirkjutónleiki, sum ikki varð sungið í Vágs kirkju hetta kvøldið, eru sangir av so kendum nøvnum su th. Tallis, Palestrina, W. A. Mozart og Felix Mendelsohn-Bartholdy.

Dámar tær væl góðan kórtónleik, so far til konsertina í Norðurlandahúsinum hóskvøldið 17. aug.